# Bilar

**Magnus Gunnarsson**
*maggi@sosialurin.fo*






*Allir teir fyrstu Fiat 500 TwinAir, sum komu á marknaðin, eru ljósabláir eins og hesin*

## FIAT 500 við tveimum sylindarum

Eins og teir upprunaligu Fiat 500, sum komu á marknaðini í 1957, fæst tann nýggi Fiat 500 nú eisini við tveimum sylindarum.

Talan er um ein spildurnýggjan modernaðan 0,9 litra TwinAir motor við 85 hk. Hetta er ein rættiliga kvikur og lítið dálkandi motorur, sum koyrir heilt upp til 25 km/l. Bilurin koyrir frá 0-100 km/t upp á 11,0 sekund, og $CO_2$ útlátið er einans 95 g/km. TwinAir er ein nýggj motorteknologi hjá Fiat.

Bilurin verður royndarkoyrdur í Vinnu & Bilradio á Rás2 hósdagin kl. 16.10 saman við Jens Peturi Jensen frá Nordcar.

*mg*




*Sixt er kosið sum besta bilaleigufelag í heiminum av Business Traveller Awards*

## Business Traveller Awards

Herfyri varð bilaleigufelagið Sixt kosið sum besta bilaleigufelag í heiminum av Business Traveller Awards.

Tað eru lesarar av ferðavinnublaðnum Business Traveller Magazine, ið hava valt Sixt sum besta bilaleigufelag í 2010. Sixt leigar bilar út í 100 londum kring heimin við 175.000 bilum og 4.000 bilaleiguskrivstovum.




*Johan Mortensen og Magnus Magnussen frá elbilabólkinum hjá SEV við Mitsubishi iMiEV elbilinum*

# ELBILUR TIL SEV

**Fyri viku síðan kom ein Mitsubishi iMiEV elbilur til Føroya úr Íslandi í sambandi við tiltakið NORA**

Bilurin kom til elfelagið SEV sum liður í eini verkætlan undir heitinum El-Mobility í útnorði, sum umfatar Grønland, Ísland og Føroyar. Verkætlanin hevur sum endamál at testa elbilar í hesum trimum samfeløgunum og at meta um hvørja ávirkan økt nýtsla av elbilum fer at hava á framtíðar ferðslu.

Mitsubishi iMiEW hevur 64 hk elmotor og lithium-ion battarí. Hann kann koyra upp til 150 km upp á eina løðing, og toppferðin er 130 km/t. Bilurin er kvikur og kennist sum at koyra ein vanligan bil við 1,6 litra bensinmotori, bert uttan at ljóð hoyrist.

Í sambandi við elbilaráðstevnuna í Norðurlandahúsinum týsdagin 15. februar verður m.a. høvi at royndarkoyra hendan elbilin.

*mg*



*Magnus Magnussen "bunkrar" elbilin*